| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **P.P. Faroe Pelagic** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Á Langasandi 28, 410 Kollafjørður | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| At taka ímóti uppsjóvar ráfiski at frysta heilan ella at frysta sum flak og annað virksemi í hesum sambandi | |
| Matr. nr.: | V-tal: |
| 230r/230a | 511749 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 13/00476 | 04. feb. 2015 |

Umhvørvisstovan, tann 4/2- 2015

Suni Petersen, deildarleiðari

Lena Ziskason, umhvørvisviðgeri

## 1. Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk hin 1. november 2013 umsókn um umhvørvisgóðkenning av uppsjóvarvirkinum hjá P.P. Faroe Pelagic. Virkið tekur í móti makreli, sild, svartkjafti, gullaksi og onnur uppsjóvar fiskasløg til flakaskering og innfrystingar.

Virkið hevur havt umhvørvisgóðkenning síðan 2001, mál nr. 613-200100274-15 og ískoyti síðan 2006, mál nr. 61005-200100274-45. Tá henda góðkenning er komin í gildi, eru hinar ikki galdandi longur.

Saman við umsóknini og á fundi seinni eru móttiknar upplýsingar um framleiðslu, reinsiskipan og útleiðingar, umframt tekningar av bygningi og økinum uttanum.

Harumframt hevur Umhvørvisstovan verið og vitja á virkinum.

## 2. Góðkenning og heimildir

Henda umhvørvisgóðkenning av uppsjóvarvirki hjá P. P. Faroe Pelagic (hereftir nevnt Faroe Pelagic), matr. nr.230r/230a á Langasandi 28 í Kollafirði, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

## 3. Lýsing av virkseminum

Virkið er staðsett á matr. nr. 230r/230a á Langasandi 28 í Kollafirði. Sambært byggisamtyktini fyri Kollafjørð, er talan um øki B2, sum er lagt út sum havnarøki, har m.a. loyvt er at hava virkir, sum hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey. Virkini í hesum øki skulu kunna flokkast í umhvørvisflokk 4 og 6, sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu. Uppsjóvarvirkið verður flokka í umhvørvisflokk 6. Umhvørvisstovan metir, at ætlaða virksemið er í tráð við byggisamtyktina og reglur hjá Tórshavnar kommunu.

Virkið tekur ímóti heilum uppsjóvar fiski (makreli, sild, svartkjafti, lodnu, gulllaks) frá skipum.

Fiskurin kemur til virkið við skipum, har hann er køldur niður til umleið 0 °C. Fiskurin verður pumpaður í land saman við vatninum í tangunum, vatnið verður frásílað og pumpað umborð aftur í tangarnar á skipinum. Vatnið í tangunum umborð á skipinum inniheldur blóð, roðslu og lýsi (blóðvatn).

Rávøran kemur inn á virkið og verður síðan vigað, skild og pakkað.

**Framleiðslan:**

Fiskurin verður heilfrystur, skráskorin ella skorin til flak. Virkið hevur eina framleiðsluorku uppá 1200 tons av ráfiski um samdøgrið. Virkið væntar at hava áleið 210 framleiðsludagar um árið, svarandi til umleið 250.000 tons um árið.

Tá framleiðslan er heilur uppsjóvar fiskur, verður hann pakkaður í posar og síðan lukkaður og lagdur í bakkar og frystur.

Harafturat hevur virkið 13 flakalinjur á virkinum, har fiskurin kann verða avhøvdaður, skráskorin ella skorin til flak.

Flakalinjurnar hava orku til at framleiða áleið 450 tons/døgnið.

Eftir at vøran er innfryst og pakkað, verður hon flutt á plattar, sum síðan fara inn á frystigoymsluna, har trukkar taka ímóti og seta uppá pláss. Goymslan tekur umleið 10.000 tons.

Um framleiðslan er flakaskering, so verður nakað av slógvi. Virkið hevur tveir afturlatnar tangar uttanfyri, har slógv, óegnaður og brotin fiskur o.a. lívrunnið burturkast verður samlað. Bilur kemur á virkið og tømur tangarnar. Slógv verður latið Havsbrún.

Til reinsing av spillivatninum hevur virkið eina sokallað flotatiónskipan. Vatn og slógv verður fyrst leitt ígjøgnum eina rotosílu 60 $m^3$ /tíma. Har verður vatnið filtrerað ígjøgnum 3 mm hol og slógvið verður leitt í eina trakt, haðani tað verður pumpað í slógvtangan.

Frásílaða vatnið verður pumpað yvir á eitt bandfiltur og sílað ígjøgnum ein 800 µm dúk.

Síðan verður vatnið leitt yvir í ein tanga, í eitt sokallað DAF – system (dissolved air flotation)uttan tilseting av flokkuleringsevni. Her verða smáar luftbløðrur leiddar inn í tangan, soleiðis at feitt og bitlar lyftast upp til yvirflatuna. Haðani verður feitt og bitlar skavað omanav og leitt yvir í slógvtangan.

Virkið hevur upplýst at vatnnýtslan verður 1440 $m^3$ um samdøgrið. Flowið gjøgnum tangan er 60 $m^3$/tíma, so við hesi vatnnýtslu verður uppihaldstíðin í tanganum 72 minuttir.

Reinsaða spillivatnið veður leitt yvir í ein annan tanga og síðan á sjógv og leitt út frá bryggjukantinum og niður á gott 20 metra dýpi.

Uttanfyri virkið standa kompressarar og kondensatorar.

# 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Í hesum kapitlinum verða umhvørvisviðurskiftini lýst til tess at fáa greiði á, hvørjar treytir skulu setast til virksemið. Í viðgerðini av umhvørvisviðurskiftunum er mesti dentur lagdur á at minka um dálking og ampar frá útláti av spillvatni, lukti og larmi frá virkseminum, og at minka um árin frá dálking av lýsi og kemikalium vegna óhapp. Metingin av umhvørvisviðurskiftum er grundað á, at virkið kann taka ímóti 250.000 tonsum av ráványru um árið. Endaligu treytirnar eru settar upp í Kapitul 6.

## 4.1. Rávøra og framleiðsla

Rávøran, ið verður nýtt til virksemið er fyrst og fremst feskur uppsjóvar fiskur.

Harafturat verða ymisk sløg av hjálpirávørum sosum vaskievni nýtt.

Treyt verður sett til, at virkið í mest møguligan mun, skal brúka tey mest umhvørvisvinarligu reingerðar- og sóttreinsingarevni.

## 4.2. Luftútlát

Virkið hevur eitt oljufýr við eini orku uppá 265kWh. Roykurin frá hesum verður leiddur í gjøgnum skorstein sum er umleið 10 metra hædd frá veghædd.

Virksemið á virkinum gevur nakað av óljóði, lukti, burturkasti og útlát frá ketlinum, tí verður fyrilit tikið fyri hesum í treytunum.

### 4.3. Spillivatn

Frá virkinum verður útleidd ein blanding av UV-viðgjørdum sjógvi, ið er tikin inn á fjørðinum uttanfyri virkið, og feskvatn. Fiskurin, sum kemur inn á virkið frá skipunum, er hvørki kruvdur ella blóðgaður og verður tí roknaður sum reinur.

Virkið hevur skipað virksemið soleiðis, at alt spillivatn verður leitt ígjøgnum eina reinsiskipan.

Aftaná reinsiskipanina verður alt spillivatn leitt útum keikantin. Treyt verður sett til mest loyvda innihald av ávísum evnum, sum kann vera í spillivantinum frá P.P. Faroe Pelagic.

Virkið hevur upplýst, at tvær útleiðingar eru frá virkinum. Ógreitt er, hvør útleiðing verður brúkt, men kavari hevur verið niðri og staðfest, at við tað eina útláti var nakað av roðslu og øðrum leivdum á botninum. Hetta kann týða uppá, at spillvatnið ikki er nóg væl reinsa og tískil elvir til upphópan av evnum á botninum. Treyt verður sett til, at virkið fær klárlagt hvar útlátið verður leitt út.

Um sjónlig tekin eru um dálking, t.d. um feitt ella annað sæst á sjónum, ella nógvur fuglur savnast við útleiðingina frá virkinum, er tað ábending um, at ov nógv lívrunnið tilfar er í spillivatninum. Um so er, skal virkið gera neyðugar ábøtur at fyribyrgja hesum. Treyt verður sett um hetta í góðkenningartreytunum.

Treyt verður eisini sett til, at virkið skal hava fasta mannagongd við at kunna skipini, sum landa til virkið, at vatnið í RSW-tangunum ikki skal leiðast út á sjógv meðan skip liggja við bryggju.

### 4.4. Óljóð

Tað kann verða nakað av óljóði frá virkseminum. Serliga kann óljóð koma frá kompressarum, kondensatorum og frá skipum sum landa. Harafturat kann hugsast, at nakað av óljóði verður frá trukkum, bilum ella bátum, meðan avskipað verður.

Treytir verða settar til mest loyvda óljóð frá virkseminum.

### 4.5. Burturkast

Tað verður nakað av burturkasti frá virkinum, m.a. lívrunnið burturkast, vandamikið burturkast og vanligt burturkast at brenna og pappírsendurnýtslu.

Lívrunnið burturkast verður latið Havsbrún.

Vandamikið burturkast, sosum spillolja frá maskinum, verður samla í spilloljutangar og latið góðkendum móttakara.

Annað burturkast verður skilt og goymt í hóskandi íløtum, áðrenn tað verður latið góðkendum móttakara.

## 5. Málsviðgerð

Undir viðgerðini av umsóknini og í sambandi við at áseta treytir er m.a. hetta tilfar nýtt:

- Norðurlendsk BAT-frágreiðing: *BAT i fiskeindustrien*
- Kunngerð nr. 147 frá 19. okt. 1995 við seinni broytingum um burturkast.
- Umhvørvisgóðkenning, mál nr. 613-200100274-15 frá 9. oktober 2001
- Víðkan av umhvørvisgóðkenning, mál nr. 61005-200100274-45 frá 9. mars 2009

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent til P.P. Faroe Pelagic og Tórshavnar kommunu til viðmerkingar tann 12. des. 2014.

P.P. Faroe pelgic hevði ongar viðmekringar.
Tórshavnar kommuna vísti á kelduávísingar, sum manglaðu.

Undir málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at fyribyrgja og avmarka dálking av luft, havi og jørð, og fyribyrging av ampum av óljóði,
- at umhvørvisdálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið,
- at innaneftirlit, umhvørvisstýriskipan og skrásetingar eru sambært viðurkendum skipanum
- at umhvørvisliga best tøka tøknin (BAT[1]) í størst møguligan mun verður nýtt,
- at reinsiskipanin eru undir regluligum eftirliti,
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær, skal minkast mest møguligt,

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum:

# 6. Góðkenningartreytir

## 6.1. Almennar treytir

6.1.1. Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

6.1.2. Allar sýnistøkur og kanningar v.m. sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.1.3. Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av P.P. Faroe Pelagic.

6.1.4. Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

6.1.5. Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið steðgar, skal alt leyst tilfar og útgerð uttandura beinast burtur.

6.1.6. Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

6.1.7. Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

6.1.8. Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

[1] **Best Available Techniques**. Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum, avmarking av burturkasti, endurnýtslu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

## 6.2. Innrætting og rakstur

6.2.1. P.P. faroe Pelagic skal í størst møguligan mun nýta best tøku tøkni (BAT) til framleisðluna og til reinsing av spillivatni.

6.2.2. Mest loyvda móttøka av ráfiski sambært hesi góðkenning er 250.000 tons/ár.

6.2.3. Um P.P. Faroe Pelagic ætlar at økja um framleiðsluna, skal Umhvørvisstovan hava fráboðan um hetta í seinasta lagi seks mánaðir frammanundan.

6.2.4. Virkið skal rekast og viðlíkahaldast soleiðis at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

6.2.5. P.P. Faroe Pelagic skal hava fasta mannagongd við at kunna skipini, sum landa á virkinum um, at vatnið í RSW-tangunum má ikki leiðast á sjógv innan fyri 3 fjórðingar úr landi.

6.2.6. P.P. Faroe Pelagic skal hava eftirlit við lekum frá køliskipanini.

## 6.3. Goymslur

6.3.1. Kemikalii og reingerðarevni skulu goymast soleiðis, at óviðkomandi ikki hava atgongd til goymslurnar.

6.3.2. Innandura kemikaliigoymslur skulu hava kemikaliitætt gólv uttan frárensl og vera skipaðar soleiðis, at útlát vegna lekar ella óhapp kunnu haldast aftur í kemikaliutøttum bakka ella tanga.

6.3.3. Bakkin ella tangin skal kunna rúma nøgdini, sum kann vera í tí størsta ílatinum á staðnum.

6.3.4. Innandura kemikaliigoymslur skulu hava hóskandi luftskifti í mun til evnini í goymsluni.

6.3.5. Uttandura kemikaliigoymslur skulu standa á lendi og í garði, sum heldur spilli ella lekum aftur svarandi til minst eina ferð nøgdina í størsta ílatinum av viðkomandi kemikalii.

6.3.6. Ventilur til at tøma regnvatn úr uttandura tangagarði við kemikalii skal altíð vera stongdur. Eftirlit skal vera við, tá tangagarðurin verður tømdur.

6.3.7. Flótandi og føst evni skulu goymast í íløtum, sum hóska til endamálið, og sum eru merkt, soleiðis at tað sæst, hvat er í.

6.3.8. Evni, ið standa uttandura , skulu vera í íløtum, sum eru góðkend til uttandura goymslu.

## 6.4. Spillvatn

6.4.1. Vatn úr RSW-tangum á skipum, ið landa til virkið, skal pumpast umborð aftur í tangarnar á skipinum. Skittvatn skal ikki lensast fyri borð, meðan skipið liggur við bryggju.

6.4.2. Spillvatn skal leiðast ígjøgnum hóskandi reinsiskipan, áðrenn tað verður leitt á sjógv.

6.4.3. Reinsiskipanin skal hava eina síl, har meskavíddin er í mesta lagi 1 mm og feittskiljara, har spillvatnið verður hildið aftur í minsta lagi 15 min og har víddarlastin í mesta lagi er 10 $m^3/m^2$/tíma.

6.4.4. Spillvatnsskipanin skal verða gjørd, so at evni og tilfar í størst møguligan mun verða afturhildin.

6.4.5. Spillvatni skal yvirhalda tey markvirði, sum eru ásett í treyt 6.4.15. talvu 1.

6.4.6. Reinsiskipanin til spillvatn skal vera undir regluligum eftirliti.

6.4.7. Útleiðingin frá virkinum má ikki bera brá av olju, feitti ella aðrari dálking.

6.4.8. Spillvatn frá virkinum skal leiðast út á sjógv, har rákið førir spillvatnið úr landi, og har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingar hvørki elva til uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum.

6.4.9. Munnin á spillvatnsútleiðingini skal í minsta lagi verða 1 metur undir størstu fjøru.

6.4.10. Um tekin eru um dálking, so sum feitt ella annað tilfar sæst á sjónum, botni, ella at nógvur fuglur savnast við útleiðingina, kann Umhvørvisstovan krevja, at virkið við ávísari freist ger eina ætlan og tíðarætlan fyri bøtandi tiltøkum.
Ætlanin skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.4.11. Aftan á reinsingina skal vera møguligt at taka sýni av spillvatninum.

6.4.12. Møguligt spillivatn frá verkstaði ella maskinrúmi, skal leiðast gjøgnum oljuskiljara soleiðis, at innihaldið av mineralskari olju í mesta lagi er 10 mg/l.

6.4.13. Nýtsla av reingerðarevnum og sóttreinsingarevnum skal avmarkast mest møguligt.

6.4.14. Miðast skal eftir at nýta tey mest umhvørvisvinarligu vaskievnini.

6.4.15. Spillvatnið skal halda hesi markvirði:

| Parametur | Markvirði | Kanningarháttur |
|---|---|---|
| Suspendera evni | 300 mg/l | DS 207* |
| Feitt og olja | 100 mg/l | DS/R 208* |
| COD | 1,5 kg/tons framleitt | |
| pH | 6-9 | DS 287* |

*) ella tilsvarandi kanningarhátti

6.4.16. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger aðrar kanningar, fyri at meta um árini av útlátinum, t.d. um tekin eru um dálking á sjónum.

## 6.5. Óljóð, ristingar og ljós

6.5.1. P.P. Faroe Pelagic hevur ábyrgdina av, at bil- og trukkførarar og skipaleiðslur arbeiða so ljóðleyst sum gjørligt.

Samlaða ískoyti til óljóð frá virkseminum hjá P.P. Faroe pelagic, má ikki fara uppum niðanfyri standandi mørk, máld við næsta grannamark, á nevndu økjum og tíðarskeiðunum:

| | **mán – frí kl. 07 – 18 leyg kl. 07 – 14** | **mán – frí kl. 18 – 22 leygardag kl. 14 – 22 sunnu- og halgidagar kl. 07 – 22** | **Allar dagar kl. 22 – 07** |
|---|---|---|---|
| **Økið 1: Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram** | 70 dB | 70 dB | 70 dB |
| **Økið 2: Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram** | 60 dB | 60 dB | 60 dB |
| **Økið 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki** | 55 dB | 45 dB | 40 dB |
| **Øki 4: Bústaðarøki** | 45 dB | 40 dB | 35 dB |

6.5.2. Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirði) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.

6.5.3. Alt virksemið skal fara fram soleiðis, at tað í minst møguligan mun hevur við sær ampar av óljóði, ristingum ella ljósi.

6.5.4. Umhvørvisstovan kann krevja at virkið skjalprógvar at markvirðini fyri óljóð verða hildin.

6.5.5. Um ampar verða av óljóði, ristingum ella ljósi, skal virkið seta bøtandi tiltøk í verk.

## 6.6. Útleiðing til luft

6.6.1. Virksemið má ikki hava við sær ampar av lukti, dusti ella royki uttanfyri øki virkisins.

6.6.2. Um ampar vera av lukti, dusti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Umhvørvisstovan kann góðtaka.

6.6.3. Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir.

## 6.7. Burturkast

6.7.1. Alt burturkast skal handfarast og skiljast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[2], og skal latast til góðkendan móttakara.

6.7.2. Alt burturkast skal latast virki, sum hevur umhvørvsigóðkenning til at taka ímóti burturkasti og viðgera tað.

6.7.3. Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egnað til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

6.7.4. Burturkast skal regluliga latast góðkendum móttakara, soleiðis at goymslurnar ikki gerast ov stórar.

6.7.5. Bingjur, íløt, burturkast o.a. tilfar skulu vera tryggja soleiðis, at tað ikki fýkur í vindi.

## 6.8. Óhapp

6.8.1. Har vandi er fyri spilli av kemikalium, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

6.8.2. Virkið skal hava útgerð til upprudding eftir møgulig óhapp.

6.8.3. Henda óhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding. Størri útlát ella dálking, skal skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni .

## 6.9. Innaneftirlit og umhvørvisstýrisskipan

6.9.1. P.P. Faroe Pelagic skal altíð tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, og um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

6.9.2. P.P. Faroe Pelagic skal hava eina umhvørvisstýriskipan, sum er samsvarandi viðurkendum skipanum, so sum ISO 14001, og sum hevur mannagongdir til stýring av virksemi, dálkingar avmarkandi tiltøkum, viðlíkahaldi, skráseting o.a.

6.9.3. Umhvørvisstovan skal hava avrit av umhvørvisstýriskipanini.

6.9.4. P.P. Faroe Pelagic skal hava niðurskrivaðar mannagongdir fyri eftirlit og røkt av reinsiskipanunum.

---

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19. okt. 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. sept. 2007

6.9.5. Nevndu eftirlit skulu gerast av persóni ella virki, sum hevur neyðugan førleika at gera arbeiðini.

6.9.6. P.P. Faroe Pelagic skal hava skil á, hvussu nógv spillvatn verður leitt út frá virkinum um árið.

6.9.7. Tey komandi trý árini í oktober mánaða, skal P.P. Faroe Pelagic kanna, um botnurin út fyri útleiðingina frá virkinum er sjónliga dálkaður. Hetta skal skjalprógvast við myndum ella á annan hóskandi hátt.

6.9.8. Seks ferðir um ári skal virkið taka sýnir av spillvatnium. Sýnini skulu takast meðan fult virksemi er og aftaná reinsingina.

6.9.9. Sýnini skulu takast javnt býtt ígjøgnum ári og takast meðan virksemið er og skulu kannast sambært 6.4.15.

6.9.10. Umhvørvisstovan kann taka sýni av reinsaða spillivatninum og senda tað til kanningarstovu at kannast sambært 6.4.15. Tó í mesta lagi einaferð um ári.

6.9.11. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytirnar um óljóð, ristingar og ljós verða hildnar.

6.9.12. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger aðrar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

6.9.13. P.P. Faroe Pelagic kunnar Umhvørvisstovuna um niðurstøðurnar í øllum omanfyrinevndu kanningum, frágreiðingum og ætlanum í seinasta lagi ein mánað eftir, at virkið hevur fingið tær til vega.

6.9.14. Um ein kanning ella frágreiðing vísir, at ásetingarnar í hesi góðkenning ikki verða hildnar, skal P.P. Faroe pelagic í seinasta lagi eina viku eftir at tílík kanning ella frágreiðing er fingin til vega, senda Umhvørvisstovuni avrit av kanning ella frágreiðing saman við ætlan við bøtandi atgerðum.

## 6.10. Rakstarskráseting/umhvørvisfrágreiðing

6.10.1. Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nøgd av móttikinum ráfiski, býtt á fiskaslag
- Nøgd av framleiddari vøru, býtt á slag
- Avhendaðar nøgdir av slógvi, býtt á móttakara, tons
- Nøgd av útleiddum spillivatn uppgivi í $m^3$
- Avhendaðar nøgdir av burturkasti, býtt á móttakara, tons ella $m^3$
- Eftirlit og røkt av reinsiskipan, herundir títtlieki og nøgd av tilfari, tons
- Nøgdir og slag av vaskievnum, sóttreinsingarevnum o.ø.
- Nýtsla av ammoniakki, litrar
- Rakstrartrupulleikar/óhapp
- Orkunýtsla
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi

6.10.2. Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum og skulu goymast í 5 ár.

6.10.3. P.P. Faroe Pelagic skal á hvørjum ári gera umhvørvisfrágreiðing sum í minsta lagi inniheldur:

- uppgerð av rakstrarskrásetingum
- uppgerð av samlaðum útlátum av kannaðu evnunum
- kanningarúrslit og viðkomandi tulking av úrsltinum
- møgulig dálkandi óhapp
- frágreiðing um umhvørvisskipan og umhvørvisviðurskifti

- gjørd og ætlað umhvørvistiltøk

sum skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi ári.

## 7. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Avrit:** Tórshavnar Kommuna, Postsmoga 32, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn